

## Tofta skúli

Heygsveg 28 · FO 650 Toftum
Tlf. 447332 · fax 449532 · t-postur: tof@skulin.fo

# Lærarastørv og størv sum stuðul í Tofta skúla

**Hesi størv verða lýst leys til setanar frá 1. august 2008 at rokna:**

- **3 tíðaravmarkað lærarastørv, fulla tíð** fyri millum annað lækkað tímatal og serligan tørv
- **1 tíðaravmarkað lærarastarv uml. 20 t/v** endaliga tímaáseting av hesum starvi verður ásett eftir 1.september 2008
- **1 tíðaravmarkað lærarastørv, fulla tíð fyri lærara í barnsburðarfarloyvi skúlaárið 2008/2009**
- **4 tíðaravmarkað størv sum stuðul** 3 størv eru 24 t/v og 1 starv er 8 t/v talan er um stuðul til næmingar, sum hava serligan tørv

**Skúlanum tørvar lærarar, ið kunnu átaka sær:**

- føroyskt og týskt í framhaldsdeildini
- ítrótt í grund- og framhaldsdeildini
- føroyskt, danskt og enskt í grunddeildini
- handverk og list í grund- og framhaldsdeildini
- serligan tørv

**Vit vænta at tú:**

- ert fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur
- ert fús/ur at taka á teg tær uppgávur sum eru í skúlanum
- í samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vil vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so at tey, ið sett verða, eru tænastumannasettir lærarar frammanundan.

Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Størvini sum stuðlar verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi mikudagin 18.juni kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um størvini frá Maritu Dalsgaard, skúlastjóra á tlf. 447332 & 747765.

**Tofta skúli** hevur komandi skúlaár uml. 196 næmingar í 1. – 10.fl. og um 20 lærarar. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/tof/


# Skrivstovuhølir til leigu

Skrivstovuhølir til leigu frá 1. august. Hølini standa sentralt í Tórshavn, og eru umleið 100 m². Góð parkeringsviðurskifti.

Nærri upplýsingar fáast á tlf. 310236/552504


LEIRVÍKAR KOMMUNA

## Leirvíkar Skúli

**Samognarbøur 4 · 520 Leirvík**

# LÆRARASTØRV
## og starv sum stuðul

**Søkt verður eftir 3 lærarum og einum stuðli skúlaárið 2008/2009**

**Eitt fast starv fulla tíð.**
**Eitt starv fulla tíð vegna lærara í farloyvi.**
**Eitt tíðaravmarkað starv fulla tíð vegna avlopstímar og tímar vegna serligan tørv.**
**Endaliga tímatalið verður ásett eftir 1. sept.**
**Eitt starv sum stuðul 25 tímar.**

**Søkt verður eftir lærarum/stuðli, sum**

- Undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skal undirvísa og taka lut í dagligt arbeiði skúlans
- Dugir at samstarva og er fyrikomandi.
- Er fúsur at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum.

**Vit vænta at tú ert**

- Fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur
- Virkisfús/ur og hugað/ur fyri toymissamstarvi.
- Vilt vera við til at menna eftirmetingar
- Vil vera við til at innføra portfolio
- Í samstarvi við leiðsluna og starvsfelagar vilt vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Harumframt skulu lærararnir**
hava førleika at undirvísa í nøkrum av hesum lærugreinum:

Føroyskum, støddfrøði, donskum, enskum, søgu, náttúru og tøkni, handarbeiði, smíð, ítrótti og svimjing,

**Førleikakrøv**
Læraraútbúgving og linjulestur í onkrari av nevndu lærugreinum.
Royndir í føroyska fólkaskúlanum.
Lærararalesandi, sum taka prógv í summar, kunnu eisini søkja størvini.
Stuðulin: Pedagog ella onnur viðkomandi útbúgving/starvsroyndir.

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verður lønt í lønarflokki 18.1 – 29.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Tey, sum sett verða, verða sáttmálasett, uttan so at tey frammanundan eru tænastumenn í fólkaskúlanum.

Stuðulin verður løntur sambært sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v., avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast til Leirvíkar skúla merkt: Til fyrstalæraranum.

Umsóknarfreistin mánadagin 16. juni 2008, kl. 18.00.

Áhugað kunnu venda sær til Leirvíkar skúla, tlf. 443234 ella 743234 og spyrja eftir Fríðfinni Johnsson.

**Leirvíkar Skúli** hevur komandi ár uml. 90 næmingar og 9 lærarar. Skúlin er ikki árgangsbýttur í øllum árgangum. Tú kanst lesa meira um skúlan á heimasíðuni www.skulin.fo/lei

Lesið Sosialin -so eru tit við!

SERNÁMSDEPILIN

Endurlýsing

# Samskipari til NSR tænastuna í Tórshavnar Kommunu

## námsfrøðilig- sálarfrøðilig ráðgeving

Í Sernámsdeplinum er eitt starv sum samskipari leyst til setan skjótast til ber. Dagliga tænastustaðið verður NSR tænastsan á Frælsinum 30, men er samskiparin partur av leiðsluni fyri sernámsfrøðiliga virksemið, ið Sernámsdepilin stendur fyri.

Fyrsta uppgávan verður í samráð við Tórshavnar kommunu og Sernámsdepilin at fyrireika stovnsetanina av NSR tænastuni, ið skal lata upp 1. august 2008.

**Førleikakrav**
Tú hevur lærara-, pedagog-, sálarfrøði- ella aðra viðkomandi útbúgving. Tú hevur starvsroyndir í pedagogiskt mennandi arbeiði við børnum og ungum. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur viðkomandi eftirútbúgving og leiðsluroyndir.

**Uppgávur**
Tú fert at leiða og samskipa arbeiðið í tænastuni og vera andlitið úteftir. Tú gert tær hugsanir um, hvussu sernámsfrøðin kann mennast og samskipast. Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt og samstundis hava hug og hegni at arbeiða tvørfakligt og at samstarva við aðrar fakbólkar.

**Løn og setanarviðurskifti**
Eftir sáttmála við avvarðandi fakfelag

Sum liður í menningini á sernámsfrøðiliga økinum hevur Tórshavnar Kommuna í samstarvi við Sernámsepilin og Mentamálaráðið gjørt av at seta á stovn NSR tænastu á Frælsinum 30 í Tórshavn. Tænastan skal vera klár at virka 1. august 2008 og skal veita skúlum, stovnum, foreldrum og øðrum avvarðandi at børnum og ungun ( o – 18 ár ) námsfrøðiliga- og sálarfrøðiliga ráðgeving.

Manningin í fulltíðarstavi í NSR tænastuni verður: 1 samskipari – 2 sálarfrøðingar – 2 serlærarar, ið reka talimennandi og námsráðgevandi arbeiði og 1 skrivari, ið verður settur av kommununi . Lokalu serlærarnir eru part av síni arbeiðstíð knýttir at NSR tænastuni – tils. svarandi til á leið 2 størv.

**Sernámsfrøðiligu tænastueindirnar á Glyvrum, í Vági og nú í Tórshavn**

- samskipa serundirvísing og ráðgeving millum skúlar, stovnar, myndugleikar og foreldur í økinum
- veita kommunum ráðgeving í sernámsfrøðiligum spurningum
- skipa fyri skeiðum fyri starvsfólk og foreldur
- virka fyri at skipa heildartilboð fyri børn við serligum tørvi
- samstarva við barnaverndarstovur, heilsusystrar og sosialar deildir

Meira fæst at vita við at venda sær til Hans Eli Dahl, stjóra.

Umsóknir við avriti av próvskjølum og møg. viðmælum skulu vera Sernámsdeplinum í hendi tann 25. juni 2008.

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 – Postrúm 2036 – FO 165 Argir
Tlf. 314522 – Fax 310196
E – postur: sernamsdepilin@snd.fo